# Súkklarnir stóðu seg einki serligt

**Føroysku súkklararnir formáddu sær lítið í kappingin í einkultstarti sunnudagin. Gunnar Dahl-Olsen stóð seg frægast og endaði sum nummar 10. Føroyska liðið gjørdist samanlagt nummar 6**

SÚKKLING

*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Tingwall:** Fýra av føroysku súkklarunum royndu seg í einkultstarti sunnudagin, og tríggir teirra komu á mál. Føroyingarnir vóru als ikki í nánd av heiðursmerkjum hendan dagin, og fremsta plaseringin var nummar 10.

Teir fýra súkklumenninir, sum fóru av rampuni mitt á høvuðsvegnum úr Lerwick og norður á Mainland, vóru Eli Christiansen, Esmar Joensen, Gunnar Dahl-Olsen og Christian Guttensen.

Tann seinasti av teimum kom ongantíð á mál, tí hann punkteraði, tá ið hann hevði súkklað helmingin av teimum 40 kilometrunum.

Bogi Kristiansen skuldi eisini verða við í kappingini, men hann tók seg aftur, tí hann vildi spara kreftir til aðrar kappingar.

### Eingi heiðursmerki hesaferð

Vónirnar til hesa kappingina vóru einki serligar hjá tí føroyska liðnum, og tað skuldi eisini vísa seg, at tað var órealistiskt at droyma um heiðursmerki í júst hesari kapping.

Gunnar Dahl-Olsen fekk tað besta úrslitið av føroysku súkklarunum, og hann kom í mál sum nummar 10. Eli Christiansen gjørdist nummar 21 og Esmar Joensen nummar 39.

Samanlagt gav hetta føroyska liðnum eina plasering sum nummar 6.



*Súkklarnir mistu luftina. Gunnar Dahl Olsen varð bestu føroyingurin við einum 10. plássi*

# Skjúttarnir raktu ikki formin

**Sunnudagin vóru føroysku skjúttarnir við í liðkappingum í trap og í sporting, men truplu umstøðurnar hjá ítróttinum heima í Føroyum ger, at tað er vónleyst at standa seg heilt væl í slíkari kapping**

SKJÓTING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Regin Enghamar hevði tvey góð umfør, har hann rakti 20 og 21 av teimum 25 dúgvunum, sum teir skutu eftir í hvørjum umfari*

**Tingwall:** Skotini dundu á markini við Tingwall –þingvøllr – sunnumorgunin. Byrsuskjúttarnir siktaðu, skutu og raktu sum oftast.

Millum skjúttarnar vóru eisini føroyingar, sum vóru við í Oyggjaleikum fyri fyrstu ferð síðani 1993.

– Vit hava onga breyt at venja hesa skjótingina á, og tí kunnu vit als ikki fyrireika okkum nóg væl til eina slíka kapping. Vit brúka Oyggjaleikirnar sum eitt slag av venjing og fyri at vita, hvussu vit eru fyri, segði Simmi Jacobsen, sum er leiðari hjá skjúttunum á ferðini til Hetlands.

Hann fylgdi spentur hvørjum skoti í kappingini sunnudagin, og hann fegnaðist tær løturnar, tá ið tað gekk væl.

### Trupult at raka formin

Føroyingar høvdu lið við í tveimum skjótikappingum sunnudagin. Onnur kappingin var í trap, og har endaðu Kári Enghamar og Bogi Wardum numm ar 9 av 10 oyggjum, men inn ímillum gekk tað heilt væl hjá føroysku skjúttunum.

– Vit mangla heilt einfalt venjing. Fyrr plagdi eg at raka omanfyri 20 dúgvur, men nú liggi eg millum 13 og 16. Tað er vónleyst at verða í góðari venjing, tá ið vit onga breyt hava at skjóta á, segði Bogi Wardum.

Regin Enghamar kláraði seg nakað betur. Hann byrjaði illa við 16 plettskotum, men kom síðani upp á 20 og 21.

Skjúttarnir í høvuðsstaðnum hava manglað skjótibreyt í fleiri enn 10 ár, men teir stríðast framhaldandi fyri at sleppa fram at onkrum øki. Og av og á skjóta teir á breytini hjá Sunda Byrsufelag

Gunnar og Marius Joensen vóru við í kappingini, sum teir kalla sporting, og teir endaðu sum nummar 10.